**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 2038.**
**Tíðarskeið: 8/9-15/9 - 2020**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, Ian Salter, Mourits Mohr Joensen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski og hýsu varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu og longu. Ian Salter tók prøvar av sjógvi til sínar kanningar av e-DNA.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Útgerð til eDNA kanningar. Miniloggarar til at máta temperatur á trollemmunum.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini týskvøldið 8/9 kl 22:45. Túrurin var seinni enn vanligt vegna tekniskar trupulleikar og tí var bara farið eftir teimum 20 støðunum í strata 17, meðan tær djúpu støðirnar í strata 18 vóru lagdar burturímillum. Tóku støðir í norðara/eystara parti av bankanum og fluttu okkum í ein landsynning. Leygardagin lógu vit bakk vegna vánaligt veður. Vit tóku ikki tær vanligu CTD-støðirnar men heldur eina CTD-støð per fiskihál soleiðis, at eDNA úrstlit kundu samanberast beinleiðis við veiðina per hál. Mánadagin máttu vit bróta túrin av vegna oljuleka til trolspølini. Vit tóku tilsamans 17 av teimum 20 støðunum í strata 17. Vóru á Havnini mikudagin kl. 7 og landaðu til Barðið kl. 8.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av toski og upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 16. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og lagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit (Talva 1, Mynd 1):** Tað var minni at fáa av toski í mun til somu tíð í fjør og nógv minni enn tað, sum var fingið í mars í ár. Nøgdin av toski var bert 24% í mun til árini frá 1996 til 2003, tá toskurin á Føroyabanka var væl fyri. Av øðrum fiskasløgum kann nevnast, at tað var nógv til av hýsu, longu, havtasku og hvítingi í mun til onnur ár og at tað var lítið til av upsa, mathøgguslokki og gulllaksi. Magakanningarnar vístu, at tað var nógv til av smáari nebbasild men lítið til av krabbadýrum.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 2038 – yvirlitstroling á Føroyabanka. Í 2020 vóru bert 17 støðir tiknar ímóti teimum vanligu 29.

| FISKASLAG | KG Í 2020 | NYTRUR | MAGAR | KG Í 2019 | Lutfall KG per støð 2020/2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 26706,976 | 373 | 139 | 34518,612 | 1.32 |
| TOSKUR | 787,590 | 94 | 63 | 2347,311 | 0.57 |
| HVÍTINGUR | 460,030 | | | 607,331 | 1.29 |
| UPSI | 421,490 | 35 | 22 | 459,520 | 1.56 |
| MATHØGGUSLOKKUR | 387,855 | | | 289,163 | 2.29 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 351,979 | | | 303,083 | 1.98 |
| LONGA | 281,430 | 44 | 3 | 799,399 | 0.60 |
| HAVMÚS | 276,996 | | | 3138,126 | 0.15 |
| HVÍTINGSBRÓDIR | 159,143 | | | 198,106 | 1.37 |
| GLASKVOYSA | 100,703 | | | 35,875 | 4.79 |
| KALVI | 142,250 | | 1 | 0 | |
| KORALL LOPHELIA | 99,622 | | | 14,200 | 11.97 |
| HAVTASKA | 86,310 | | | 194,675 | 0.76 |
| KNURRHANI | 76,006 | | | 53,523 | 2.42 |
| GLÝSUFISKUR | 52,336 | | | 93,542 | 0.95 |
| SKØTA (BATIS) | 40,565 | | | 19,400 | 3.57 |
| SVARTKJAFTUR | 29,406 | | | 622,025 | 0.08 |
| GAMAL FISKUR | 26,782 | | | 0 | |
| SANDSPRØKA (LL) | 19,870 | | | 0 | |
| ROSSAMAKRELUR | 18,345 | | | 21,141 | 1.48 |
| BROSMA | 13,340 | 6 | | 70,930 | 0.32 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 11,860 | | | 75,782 | 0.27 |
| TUNGA | 10,441 | | | 33,690 | 0.53 |
| IGULKER ECHINIDAE | 9,987 | | | 5,790 | 2.94 |
| NEBBASKØTA | 8,440 | | | 5,550 | 2.59 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 5,580 | | | 103,423 | 0.09 |
| SKADDUR FISKUR | 2,166 | | | 18,236 | 0.20 |
| REYÐI KNURRHANI | 1,505 | | | 13,787 | 0.19 |
| SILVURMURTUR | 0,886 | | | 82,692 | 0.02 |
| GÁGGUKRABBI PAGURUS SP | 0,634 | | | 0 | |
| NEBBASILD | 0,586 | | | 0,302 | 3.31 |
| SKRAMBUL | 0,151 | | | 2,370 | 0.11 |
| KROSSFISKUR ASTERIIDAE | 0,134 | | | 0 | |
| GÁGGA | 0,031 | | | 0 | |
| TILSAMANS | 30612,484 | 552 | 228 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski, hýsu, longu og upsa per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.




Mynd 2. Nøgd av tungu, havtasku, mathøgguslokki og glýsufiski per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.




Mynd 3. Nøgd av lítla kongafiski og hvítingi per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur2038d.txt”.

Petur Steingrund